## Tjóðveldislistin í Eysturkommunu

Tjóðveldi í komandi Eysturkommunu hevur stillað upp 10 valevni til komandi kommunuval. Á listanum eru fýra av verandi bygdaráðslimum. Páll Isholm og Maud Poulsen úr Gøtu og Dánjal Andreasen og Johan Chrisiansen úr Leirvík. Listin umboðar sera breitt fólkið í Leirvík og Gøtu. Við hesi uppstilling ætlar Tjóðveldi at fáa eina sterka støðu í fjórðstørstu kommunu landsins.

**Listin er hesin:**
Dánjal Andreasen, Leirvík
Johan Christiansen, Leirvík
Árant Hansen, lærari, Norðragøta
Páll Isholm, deildarstjóri, Syðrugøta
Súsanna M. Joensen, Syðrugøta
Tollakkur Joensen, Norðragøta
Tummas Justinussen, Leirvík
Elin Olsen, Leirvík
Maud Poulsen, Gøtueiði
Jan Dam Vang, Leirvík

# Stór FAROEXPO verður




*- Tað týdningarmesta er at hvør einstøk fyritøka fær nakað burturúr, sigur Símun Hammer, fyriskipari*

**- Tað týdningarmesta við FAROEXPO í Runavík er, at tær fyritøkurnar sum eru her, eru viðkomandi hvør fyri aðra, soleiðis at tær allar kunnu fáa nakað burtur úr og nakað burtur úr hvørji aðrari, sigur Símun Hammer, fyrireikari. Samstundis sum henda stevnan verður hildin eru hópur av mentanarligum tiltøkum kring allan býin**

FAROEXPO '08
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Runavík:** - Tá vit byrjaðu í 2005 vóru einans 25 fyritøkur við. Til stevnuna í árhavavitskipaðmarknaðarføringina betur, og nú eru 47 fyritøkur við.

- Vit ætla at fáa uppaftur fleiri við komandi ár, og tað skal ikki undra nakran um 60 fyritøkur verða við tá, sigur Símun Hammer við Sosialin.

Luttakararnir í ár eru flestir úr Føroyum, men eisini fyritøkur úr Noregi og Danmark eru væl umboðaðar á stevnuni. Hinvegin er eingin fyritøkan úr Íslandi ella úr Bretlandi.

Teir hava ikki satsað so nógv uppá Bretland, men ein ávísur áhugi var fyri at fáa íslendingar hendavegin. Hetta eydnaðist kortini ikki.

- Vit merktu tað nokkso týðiliga, at tað koyrdi tungt hjá íslendingum, og at fyritøkurnar vóru seinar at taka avgerð um tær skuldu luttaka ella ikki. Men vit valdu so at leypa upp um Ísland og heldur venda eyguni til hini bæði londini.

- Eg haldi, at stevnan í ár hevur eydnast avbera væl, sigur Símun Hammer.

FAROEXPO byrjaði í gjár í Runavík og endar við ráðstevnu í Kelduni í Skálafirði seinnapartin í dag.

### Positiv gongd

Fyri fyrireikaran, Símun Hammer er eingin ivi um, at FAROEXPO hevur fingið sítt fasta pláss í tilvitanini hjá vinnulívinum heima og úti.

Sambært honum hevur stevnan eisini ment seg so mikið nógv og er haraftrat vorðin so stór, at hon í roynd og veru er vorðin ein fastur táttur í menningini av føroysku og útlendsku fyritøkunum.

*Tað er helst so, at tess fleiri fyritøkur sum eru við, tess størri møguleiki at tann einstaka fyritøkan fær okkurt burtur úr onkrum*

- Í ár er talið av luttakarum nærum tvífalt so nógv sum tað var fyri fýra árum síðani.

- Tað er tó ikki einans í støddini at stevnan er víðkað. Luttakararnir hjá hvørji fyritøku sær er eisini í vøkstri, slær Símun Hammer fast.

Ein týðilig broyting er, at nógvar av fyritøkunum, sum áður bert høvdu eitt